## Barca setir met

Tað hevur gingið óvanliga væl hjá FC Barcelona í hesum kappingarárinum. Nú hevltin av dystunum eru leiktir í sponsku landskappingini, hevur Barcelona vunnið sær 50 stig. Tað er nýtt met. Real Madrid átti metið vði 47 stigum eftir helvtina av dystunum. Barcelona er heili 15 stig frammanfyri næstu kappingarneytarnar í Primera Division.



## Kinnear revsar undanmenn

Joe Kinnear, sum venur Newcastle, heldur at hann kann ikki lastast fyri keyp av spælarum, sum undanmenn hansara í starvinum hava gjørt. Kevin Keagan og Sam Allerdyce hava vant felagið, og teir hava keypt nógvar av spælarunum, sum eru í Newcastle nú. - Vit hava ein lítlan hóp, sum undanfarnu venjarar ikki hava gjørt nakað við. Eg kann ikki revsast fyri tað, sigur Joe Kinnear við BBC.




*Jóhan Hofgaard ristist ikki á hondunum, tá hann fekk møguleikan í málinum hjá H71. Í sínum elddópi tók ungi hoyvíkingurin fullkomuliga myndina, tá H71 aftur vann seg á beint í stríðnum um at røkka finalusessinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**H71-Kyndil 22-19 (11-8):**

# Landsliðið sett á beinkin

**Hóast týdningurin av dystinum var stórur, so var tað avrikið hjá blaðunga Jóhan Hofgaard, sum var í fokus, tá H71 sunnudagin steðgaði sigursgongdini hjá Kyndli**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Venjararnir hjá H71 hava ein sannan luksus-trupulleika. Við tveimum landsliðsmálverjum í hópinum er sjálvandi ikki lætt at gera av, hvør teirra skal sita á beinkinum.

Sunnudagin høvdu venjararnir tó tikið avgerð, um at seta báðar landsliðsmenninar á beinkin. Í teirra stað varð bert 19 ára gamli Jóhan Hofgaard settur, eftir at hann í longri tíð hevur givið meira royndu liðfeløgunum kapping.

Kanska varð ehtta gjørt, soleiðis at ungi málverjin fekk snoddað til hondbólt í fremstu røð, og í øllum førum má bara staðfestast, at ungi málverjin tók av. Við báðum landsliðsmálverjunum sum ídnum stuðlum, ið støðugt vegleiddu og heppaðu, stóð ungi máðurin enn branddyst av tí slagnum, sum helt báðum starvsfeløgunum á beinkinum í samfullar 60 minuttir.

Og mest av øllum var hetta eisini munurin, tá H71 stegaði sigursgongdini hjá Kyndli, sum íroknað dystirnar í steypakappingini annars var komin upp á fýra dystir.

Eini grannauppgerð so líkt, so var spælið í longum løtum rættiliga rótut. Hoyvíkingar megnaðu sjáldan at ferðina upp á eitt støði, har teir veruliga kundu stressa ikki heilt so breiða hópin hjá Kyndli, og fleiri ferðir koppaði spælið tann vegin, at teir grønu fingu møguleikan at stinga av.

Ikki tí. Lars L. Black í Kyndils-málinum átti sín stóra lut í, at Kyndil støðugt var við í dystinum, men í hinum endanum stóð nýggi H71-málverjin enn sterkari. Og bein t undan steðginum bar hetta við sær, at hoyvíkingar fingu møguliekan at leggja seg nøkur mál framum.

Og so var støðið líka sum lagt fyri seinna hálvleik. Her var nervin alla tíðina til staðar, tí Kyndil noktaði at geva upp, hóast mótbrekkan var tung.

Eina einstaka ferð fingu teir eisini minkað munin niður í eitt mál, men í aðrar mátar vórðu opnir møguleikar misnýttir, hvørja ferð teir grønu veruliga høvdu møguleikan, og at enda megnaðu hoyvíkingarnir eisini at revsa hetta.

### FAKTA um dystin

**H71-Kyndil 22-19 (11-8):**
**10 min:** 3-3
**20 min:** 6-5
**40 min:** 14-10
**50 min:** 17-16
**Málskjúttar**
**H71:** Gunnar Bláberg 4, Johnny Durhuus 3, Janus Sørensen 3, Halgir Dahl Olesen 3(2), Danni Syhler 2, Poul Kjartan Dam 2, Bárður Brimvík 1
**Kyndil:** Bárður Johannesen 9(2), Høgni Klein 4, Josef Abrahamsen 2, Janus Einar Sørensen 2, Hans Arni B. Thomsen 1, Rani Ellingsgaard 1
**Brotskøst:** H71 2, Kyndil 2
**Útvísingar:** H71 4, Kyndil 3
**Dómarar:** Kristian Joensen & Karstin Joensen

### Tvídystur

Úrslitið ber við sær, at kapprenningin í oddinum nú aftur er farin at líkjast einum tvídysti millum Neistan og H71, sum vilja sleppa í finaluna móti VÍF, sum longu er heilt væl ávegis.

Við góðu gongdini í mentu, so var ikki óhugsandi, at Kyndil eisini kundi leggja seg út í kappingina, men tann møguleikan má nú sigast at vera farin. Og tað er nokk eingin ivi um, at fokus hjá teimum grønu nú er á steypakappingini, har teir hava møguleika at tryggja sær, at eisini hetta kappingarárið kastar heiðursmerki av sær.

Hoyvíkingar sýndu kanska ikki nóg gott álopsspæl hesaferð, men í verjuni stríddust teir framúr, og tá teir so eisini hava tríggjar málverjar í landsliðsflokki gevur hetta venjarunum nøkur góð alternativ á teirri síðuni.

## Verjan var lykilin

**Heldur enn at seta fokus á sítt egna avrik, valdi stjørnuskotið í H71-málinum at geva verjuni heiðurin av sigrinum móti Kyndli**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fram til í gjár vóru ikki so nógv í føroyska hondbóltsheiminum, sum kendust við Jóhan Hofgaard.

Men tey, sum vóru í Hoyvíkarhøllini í gjár, hava í øllum førum bitið merkið í navnið, sum uttan iva verður at hoyra rímiliga ofta komandi árini.

Eftir framúr gjøgnumbrotið, har Jóhan stóð samfullar 60 minuttir í H71-málinum, vildi 19 ára gamli málverjin tó ikki sjálvur gera alt ov nógv burtur úr sær sjálvum.

– Fyrst og fremst gleðist eg bara um, hvussu gott tað er at hava slíkar menn sum Jens Skipagøta og Levi Nybo afturat mær undir venjing. Tað hevur lært meg ótrúliga nógv, og í dag stuðlaðu teir mær alla tíðina, so hetta var ein fantastiskt uppliving.

*Men var hetta ikki ein av heldur strævnu døgunum sum málverji?*

- Eg haldi, at verjan hjá okkum gjørdi eitt serstakliga stórt arbeiði. Og tað var fyrst og fremst har, at vit vunnu dystin. Tað hevði ovurstóran týdning hjá okkum, at vit kundu steðga sigursrøðini hjá Kyndli, og tað er bara heilt fantastiskt, at hetta eydnaðist, sigur Jóhan Hofgaard.